

Onkursvegna ger tað teg til eitt rúmligari menniskja við einum víðari sjónarringi, og tað kann aldrin skaða, sigur Oggi Lamhauge.

### Heita skurðmyndin

Í øllum førum er listamiðlarin rættiliga sannførdur um, at góð list kann stimbra og eggja tey kreativu evni, sum búgva í okkum øllum.

- Hvat kreativitetur er, er hinvegin kanska ikki so lætt at seta orð á, ásannar Oggi Lamhauge, sum samstundis heldur, at vit eru í so skjót at seta orð á, hvør er kreativur, og hvør ikki er.

Í míni verð kann ein teldufrøðingur ella matematikari vera minst líka kreativur, sum ein stórur listamálari ella yrkjari. Í botn og grund snýr kreativitetur seg um at skapa nakað nýtt. Tí høvdu vit heldur ikki yvirlivað, um vit ikki høvdu kreativ evni.

Spurdur, hvat so kann drepa kreativitet, sigur Oggi Lamhauge, at tað nokk veldst um, tann einstaka.

- Í skúlanum fingu vit onkuntíð frymlar at tulka yrkingar eftir. Eg minnist ilt á teir, tí tá eg var komin í helvt við frymilin, var eg langt síðani hildin uppat at njóta yrkingina. So fyri meg kennast ov nógvir fastir reglar avgjørt avmarkandi, tá tað snýr seg um list og kreativitet, sigur Oggi Lamhauge.

Tí fer hann heldur ikki at gera leiðbeiningar til børnini, tá tey koma at hyggja at skurðmyndini "Móðir og barn" og øllum hinum listaverkunum. Man hann vil fegin hoyra, hvat tey halda um verkini.

- Hesa skurðmyndina hjá Fridtjof Joensen halda tey ofta vera "heita". So spyrji eg kanska, hví hon virkar heit, og fái kanska eitt svar, sum eg als ikki hevði hugsað um ...

# Á myndaveiðu á Listasavninum

**Í heystfrítíðini sleppa øll børn og ung á myndaveiðu á Listasavninum, har tey sleppa at kanna mongu listaverkini**

LIST
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

"Hvørjum hongur frakkin á?", sum Sigrun Gunnarsdóttir hevur málað, og "Hví stoyta fuglarnir seg niður í sjógvin?" í myndini hjá Janus Kamban.

Tað eru bara nakrir av spurningunum, børnini kunnu royna at svara, tá tey fara á myndaveiðu á Listasavninum í heysfrítíðini.

Hetta er fyrstu ferð Listasavnið er við á árliga Heystfagnaðinum, har øll tey ymsu søvnini gera okkurt serligt burturúr við spølum, uppgávum og hugna fyri alla familjuna.

Í hesum sambandi hava tey á Listasavninum gjørt nakrar faldarar fyri børn og ung í aldrinum 3 til 16 ár. Í faldararanum eru myndir av alskyns listaverkum, sum goyma seg onkustaðni á savninum og sum børnini skulu royna at finna og kanna nærri.

Eisini hava børnini møguleika at gera sítt egna listaverk við eitt stórt tekniborð og góðum vokskriti.




*Við sær á myndaveiðu fáa børnini nakrar forvitnisligar faldarar við spurningum, sum hóska júst til teirra aldursbólk*

# Heystfagnaður 2008

**Uppgávur og tiltøk til familjur, børn og ung um Føroya náttúru, lívið í sjónum og føroysk list.**

SØVN
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Heystfagnaðurin í ár verður hildin í heystfrítíðini í døgunum 13. til 17. oktober kl 11 – 16. Hetta er 7. ferð, Heystfagnaðurin letur upp hurðarnar fyri børnum og vaksnum til eina løtu við spølum, uppgávum og hugna.

Tiltakið er víðkað í ár. Hesuferð luttaka Føroya Listasavn, Sjósavnið og Náttúrugripasavnið (og Jarðfeingi). Listasavnið og Náttúrugripasavnið hava ókeypis atgongd. Sjósavnið bjóðar gestum til hálvan prís. Á Fornminnissavninum er opið og ókeypis somu tíðir.

### Skattajakt

Á náttúrugripasavninum og Jarðfeingi sleppa børnini á skattajak, har tey skulu leita inni og úti millum trøini millum ísbjørn, gorfugl og gimsteinar eftir bókstavum og loyniorðum. Megnar tú at finna horvnu fiskarnar? Ella fá tær eina tráðu og eitt fiskiloyvi og far og leita eftir nøkrum ávísum fiskasløgum. Tú kanst eisini fara á jarðfrøðiliga rannsóknarferð.

Tú kanst eisini koma inn í lesikrókin, látrið til kópin og hvíla teg við eini góðari bók. Ein hópur av áhugaverdum bókum finnast um náttúruviðurskifti. Her eru eisini pappír og litblýantar, so tú kanst tekna eina løtu.

Alla vikuna er ein hópur av ungum fólkum, sum ganga børnunum og teim vaksnu til handa. Manglar tær hjálp við eini uppgávu, ella hevur tú okkurt at spyrja um. Spyr eitt av hjálparfólkunum!

Ætlanin er, at starvsfólk á stovnunum koma og greiða frá um steinsløg, skera upp fiskar og greiða frá plantum, kyktum og skorðdjórum. Tak tíni egnu kykt, steinar og plantur úr føroysku náttúruni við tær og fá okkurt at vita um hesi.

### Sjósavnið

Á sjósavninum kanst tú síggja eini 30 – 40 fiskasløg av teimum 247 fiskasløgunum, sum vit kenna kring Føroyar. Hevur tú sæð hávarnar á sjósavninum? Teir eita smábettuti reyðhávurin, og teir løgdu egg í vár.

Harafturat hevur sjósavnið eina skøtu. Talan er um vanligu skøtuna. Skøta er bróskfiskur eins og hávur.

Á sjósavninum finnur tú ein hóp av krabbadýrum, lindýrum og tindadýrum. Hesi djórasløg hava onga beinagrind, tey eru ryggleys dýr.

Uppgávur eru til børnini allan heystfagnaðin, og klokkan 13 kunnu tey vera við, tá ein fiskur verður skorin upp

### Vinn eina tyrluferð

Gestir, sum vitja øll trý luttakandi søvnini, (Náttúrugripasavnið (og Jarðfeingi), Sjósavnið og Listasavnið) kunnu luttaka í eini kapping. Høvuðsvinningurin, sum Atlantic Airways letur, er ein tyrluferð fyri tvey vaksin og tvey børn. Nógvir smærri eykavinningar eru eisini.

